

*Harði hollendingurin hjá B68 sigur, at hann helst skal læra at stýra sinnalagnum eitt sindur betur*

# Ralph trívist á Toftum, og í verjuni hjá B68

**Ralph van Dooren er aftur í B68. Hesuferð verður útgangsstøðið, at hann skal leika afturi í verjuni. Hann ætlar at fáa væl minni av kortum, enn í 2006**

Ralph van Dooren er sera blíður og skemtingarsamur at tosa við. Einki er, sum fær ein at hugsa um tann niðurlendska leikaran, sum fekk hópin av kortum í 2006. Ralph leggur tó eina við, at hann hevði ikki uppiborið øll kortini hann fekk í 2006.

- Tað tók drúgva tíð hjá mær at venja meg føroysku dómarnar. Eftir mínum tykki hava útlendskir leikarar í Formuladeildini nógv lættari við at fáa kort, enn føroyskir landsliðsleikarar og aðrir kendir heimligir leikarar. Eg haldi føroysku dómarnir burdu eygleitt ensku dómarnir meir, sum duga at tosa við leikarnar, og at dempa teir niður.

Ralph ætlar kortini at gera sítt til at fáa færri kort hesuferð, og ið hvussu er ikki tey løttu kortini, sum leikarar fáa fyri at skræða seg.

**Fór aftur í verjuna**

Í 2006 leikti hann fyrst á miðjuni hjá B68, men seinastu 5 dystirnar fór hann aftur í verjuna at spæla, og har stórtrívist hann.

- Mær dámar at spæla í verjuni, bæði persónliga, og eisini fyri liðið. Tað er stuttligt at verða við til at byggja spælið upp frá verjuni og fram eftir, og tí er sera týdningarmikið, at vit ikki fara at spæla "Kick and Rush", men at vit spæla okkum upp gjøgnum vøllin. Vit hava góðar, ungar leikarar, sum eru tekniskt væl fyri, og vit hava ein góðan miðvøll at spæla til, sum kann fáa spælið longur fram til álopið.

Ralph hevur góðar vónir, og heldur ikki, at B68 hevur grund til at óttast nakað lið. Hann heldur, at tað er ein góð eyka motivasjón, at tað eru so nógv Formulalið í Eysturoynni. Tað fer at geva nógvar intensar og spennandi lokaluppgerðir. Tó dylur Ralph ikki fyri, at hann er glaður fyri at sleppa undan at sigla til Suðuroyar, sum tykist at hava verið ein uppliving, sum hann kann verða fyri uttan.

**Gekk illa í Hjørring**

Ì fjør royndi Ralph fótbóltseydnuna í norðurjútska býnum, Hjørring. FC Hjørring hevur lið í triðjubestu donsku deildini, og hevði Ralph ein sáttmála við felagið frá januar til juli 2007. Men tað gekk ikki væl í hond, Ralph fekk bara seks dystir, tí hann gjørdist illa skaddur longu í mars.

Menniskjaliga og sosialt gekk heldur ikki væl, og føldi hann seg uttanfyri í Hjørring. Ikki allir norðurjútlendingarnir høvdu tol at samskifta við hann á enskum. Tí er hann, sum menniskja glaður fyri at verða aftur á Toftum. Unnusta hansara er av Toftum, og er hon á skúla í Danmark, fyri at gera seg liðna við útbúgvingina, sum grafiskur designari/sniðgevi.

Beint áðrenn kappingin um Løgmanssteypið fór í gongd, fór Ralph ein stuttan túr niður til Danmarkar at vitja hana. Unnustan verður liðug við útbúgvingina í juni, og tá verður trivnaðurin hjá Ralph tað betri á Toftum.

**Venja seg við friðin**

- Eg mátti venja meg við friðin tá eg flutti her til, men nú njóti eg hann. Fólk her eru sera opin og vinarlig. Fyri meg hevur tað týdning, at eg kann kenni meg væl sosialt uttanfyri fótbóltsvøllin. Í Hjørring kendi eg meg ikki heima, men her á Toftum kenni eg meg veruliga heima. Eg má siga, sum er, at eg haldi tað er ein rættiliga stórur munur á mentalitetinum hjá dønum og føroyingum. Men nú kann tað sjálvsagt verða, at tit hava tað lættari at fella til í Danmark, tí tit læra danskt, sum børn.

Og tað heimliga fyri ein niðurlending er, at eins og í heimlandinum, so eru tað nógvar vindmyllur á Toftum.

Ralph stríðist við at læra seg føroyskt, hann samskiftir nógv við foreldrini hjá unnustuni. Spyr nógv, og hevur lært, at tað er eisini ein ávísur skyldskapur millum tað føroyska, og tað niðurlendska málið. Bæði er runnin av germanskari rót. Greinin er skrivað 15 dagar áðrenn útkomudagin, men hendan dagin vit tosa við Ralph á Svangaskarði er arbeiðsloyvið ikki komið.

- Løgreglan hevur sagt, at tað fer at koma fyrsta dagin. Tað vil eg sanniliga vóna, so eg fái tørna út fyri B68 hósdagin (Skírisdag red.).

Ralph van Dooren hevur fingið blóð á tonna, og kanska vatn á mylluna?

---

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

## Metingin

**Sum uppflytari kann B68 rokna við eini truplari tilveru. Nógv veldst tó um, hvørja nyttu toftamenn fáa av nýggju spælarunum. Fella hesir nóg væl til í føroyska fótbóltsheiminum, og sleppur liðið undan ov nógv skaðum, so kann úrslitið væl verða, at B68 fer at klintra væl longur upp á talvuni enn bara til strikuna yvir átta-talinum.**

Microsoft Dynamics
formula.fo